Fundur um norðhavssildina:

# Nýggja ferðamynstrið sær




*Reiðaríini hjá nótaskipunum vilja sleppa at fiska meira av norðhavssildini, nú sild framvegis stendur í altjóða sjógvi, samstundis sum prísurin á makreli ikki er so góður*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, heldur, at tað hevur stóran týdning at fáa greiði á, hvussu ferðamynstrið hjá norðhavssildini broytist. - Okkara lutur á fundinum í dag verður at sleppa at kanna hesi viðurskifti. Hin spurningurin – um føroysku nótaskipini eiga at sleppa at fiska eina størri kvotu í ár ella at fiska av kvotuni fyri komandi ár, er ein spurningur millum myndugleikarnar og reiðaríini. Tað fara vit ikki at leggja okkum út í, sigur fiskifrøðingurin**

NORÐHAVSSILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag verður fundur um norðhavssildina, har reiðaríini, sum eiga nótaskipini, væntandi fara at heita á Fiskimálaráðið um at sleppa at fiska nøkur tonsini av sild aftrat, nú tað vísir seg, at norðhavssild framvegis stendur í altjóða sjógvi norðanfyri.

Føroyska kvotan av norðhavssild, sum í 2006 er eini 68.000 tons, er uppfiskað, og sum skilst, hava skipini ikki so góðan hug at fara á makrelveiði beint nú, tí prísurin á makreli er ikki so góður í løtuni.

Herfyri førdi okkurt av reiðaríunum fram, at Fiskimálaráðið møguliga kann hækka føroysku kvotuna í ár – ella lata skipini fiska ein part av kvotuni fyri komandi ár.

### Stovnurin væl fyri

Eingin beinleiðis avtala er um norðhavssildina millum strandalondini og ES, men kvotulutfallið er á leið tað sama, sum tað hevur verið seinastu árini.

TAC'ið fyri norðhavssild hevur verið 850.000 tons, men tá ið norðmenn avgjørdu einvíst at hækka sín kvotupart, gjørdu hini strandalondini og ES tað sama, soleiðis at TAC'ið í 2006 liggur um 1 mió tons.

Hóast londini, sum fiska norðhavssild, í løtuni ikki hava nakra endaliga semju um sildina, kann kortini ikki sigast, at sildin verður fiskað óskipað.

Stovnurin er væl fyri í løtuni, og fiskifrøðingar meta ikki, at vandi er fyri stovninum, um hesi tonsini verða fiskað í 2006.

### Mynstrið broytist

Seinastu árini hevur mangan verið ført fram, at norðhavssildin er við at taka sítt gamla ferðamynstur uppaftur, og gongdin í heyst hevur styrkt um hesi útlit.

Mynstrið í nógv ár hevur verið, at norðhavssildin hevur verið í norskum sjógvi um veturin. Hon hevur staðið á firðum og út fyri Troms. Norskar kanningar vístu tó í fjør, at teir ikki "funnu" alla sildina á vetrarbeitinum, sum teir plagdu at gera, og tí hevur verið væntandi, at ein partur av stovninum helt seg aðrastaðni.

Vanliga plagar sildin ikki at vera atkomilig hjá føroyskum skipum, tá ið heystið fer at halla, men nú vísir tað seg, at norðhavssild framvegis stendur í altjóða sjógvi norðanfyri, sum hon í fimtiárunum plagdi at gera hesa tíðina av árinum.

### Rættiliga áhugavert

Jan A. Jacobsen, fiskifrøðingur, sigur, at gongdin er rættiliga áhugaverd, og hann fer tí á fundinum við Fiskimálaráðið í dag at leggja upp til, at kanningar fara fram av norðhavssildini.

- Okkara lutur á fundinum verður at sleppa at kanna hesi viðurskifti í altjóða sjógvi. Hin spurningurin – um føroysku nótaskipini eiga at sleppa at fiska eina størri kvotu í ár ella at fiska av kvotuni fyri komandi ár, er ein spurningur millum føroysku myndugleikarnar og reiðaríini. Tað fara vit ikki at leggja okkum út í, sigur hann.

Jan heldur, at tað hevur stóran týdning at fáa greiði á, hvussu ferðamynstrið hjá sildini broytist.

- Av tí, at kvotan seinastu árini hevur verið uppfiskað, tá ið líður út á heystið, hevur eingin føroysk veiða verið um veturin, og tí hava vit heldur ikki fingið staðfest við vanligari veiði, um ferðamynstrið meira og